## 30 tús. Astra bílagdir



Áðrenn nýggi Opel Astra er komin á marknaðin, eru longu 30.000 bilar bílagdir í Evropa. Bilurin kemur fyrst á týska og eysturríkska marknaðin 19. mars. Opel rokna við at selja millum 450.000 og 500.000 Astra í Evropa fyrsta árið

*Kelda: GM Danmark / Informationsafdelingen*

## Fiat 500 spøkir



Fiat 500 kemur aftur í nýggjum búna undir navninum Fiat Trepiuno. Bilurin, sum minnir nógv um gamla Fiat 500, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1957, verður sýndur fram á altjóða bilaframsýningini í Geneve nú í mars

*Kelda: Motor Magasinet*

## Honda best í USA



Ein brúkarakanning hjá "Automotive Lease Guide" í Kalifornia, vísir, at Honda er tað bilmerki í USA, sum er best umtókt og gevur mest virði fyri pengarnar

*Kelda: Motor Magasinet*




*Audi A6 verður ein smartur og framkomin luksusbilur við sportligum designi. Trapez-líknandi kølaragittari klæðir bilinum sera væl og fær hann at síggja áleypandi út*




*Linjurnar eru nakað fyri seg og í besta Audi-stíli. Frá síðuni og aftan líkist hann núverandi A6*

# Nýggjur smartur og framkomin Audi A6

**Audi sýna í hesum døgum ein nýggjan A6, sum kemur at avloysa núverandi Audi A6, ið er frá 1997. Bilurin er kemur á marknaðin í mai og verður at síggja á Copenhagen Motor Show í apríl**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nakað síðan sýndu vit myndir av nýgga Audi A8, og longu nú verður ein nýggjur A6, ið kemur á marknaðin í mai, sýndur fram.

Tað er dugnaligi designstjórin hjá Audi, Walter da Silva, sum hevur teknað bilin. Talan er um ein sera smartan og framkomnan luksusbil við sportligum designi. Í stødd er bilurin millum Audi A4 og tann størsta A8.

Nýggi Audi A6 er ein háteknologiskur bilur, har nógvir av lutunum eru úr aluminium.

A6 er fyrsti bilur sum hevur MMI (Multi Media Interface) sum standard. MMI er ein framkomin telduskipan við 6,5" skíggja og nógvum ymiskum funktiónum.



*Audi A6 innan. Leggið til merkis trapez-líknandi búmerkið í rattinum - eins og í kølaragittarinum. Multi Media Interface (MMI) verður standard í nýggja A6*

### Elektromekaniska hondbremsu

Aftan fyri klára forlyktaglasið eru Xenon-lyktir, sum snara við tá bilførarin snarar rattinum. Hondbremsan er elektromekanisk og loysnar automatiskt, tá bilførarin nemur spitarapedalin.

Málið hjá Audi er, at A6 skal vera leiðandi í sínum klassa.

Bilurin kemur á marknaðin við fimm stórum motorum, trimum bensin og tveimum diesel. Bensinmotorarnir eru hesir: 2,4 litur V6 við 177 hk, síðan ein 3,2 litur V6 FSI við 255 hk og ein 4,2 litur V8 við ikki minni enn 335 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,1 sekund. Dieselmotorarnir eru hesir: 3,0 litur V6 TDI við 225 hk og ein 2,0 litur 4 syl TDI við 140 hk, hesin kemur í august.

Undirvognurin er sera framkomin, og koyrieginleikarnir skulu vera heilt í topp.

Nýggi A6 verður at fáa til keyps í Føroyum og í Danmark í mai mánað, men bilurin verður eisini at síggja á Copenhagen Motor Show í apríl.

ítróttur

Nr. 49 • hósdagur • 11. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ljósið og Havnin fingu gullið

**Tað verða aftur í ár kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag, sum fara at umboða Føroyar, tá kappast skal um DM-heitið í rútmiskum fimleiki í ár**



*Vanligu ljósini vóru á degnum skift um við pallljós, soleiðis at fokus í størri mun varð sett á íðkararnar á gólvinum*
*Mynd: Maria Olsen*

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasta vikuskifti var stórkapping í rútmiskum fimleiki hildin í Runavík. Hesa ferð vóru tað smágentur og kvinnur, sum kappaðust, meðan gentur og pinkur fara at kappast komandi sunnudag.

### Ljósið lýsti

Hjá smágentunum vóru fimm lið, ið høvdu boðað frá luttøku, og átti Ljósið úr Havn tvey av hesum.

Tað skuldi eisini vísa seg, at Ljósið átti stinnasta liðið í kappingini, og somikið væl gekst hjá felagnum, at tær í amboðsseriuni áttu bæði tey fremstu liðini,

Endaligu úrslitini í amboðs- og fríu seriuni vóru annars hampuliga ymisk, og tó at Ljósið I var fremst í báðum førum, so undirstrikaði samlaða úrslitið týdningin av, at fimleikararnir eru væl vandir í báðum kappingargreinunum. Tí tó at havnargenturnar fingu harða kapping í báðum førum, so var samlaði oddasessurin sera sannførandi við 0,76 stigum niður til næsta liðið.

### HF til Danmarkar

Hjá kvinnunum var talið av luttakandi liðum trý, og aftur í ár vóru tað kvinnurnar úr Havnar Fimleikafelag, sum vóru tær stinnastu.

Hetta hevur við sær, at Havnar Fimleikafelag triðju ferð á rað fer at vera við, tá DM-kappingin í rútmiskum fimleiki verður á skránni. Úrslitini her hava eisini víst, at støðið í føroyskum fimleiki er rættiliga høgt, tí tó at tær sum gestalið ikki sleppa í part, tá heiðursmerki verða latin í Danmark, so hava havnarkvinnurnar ligið heilt frammi í oddinum í donsku kappingini. Enntá vóru tær fremstar fyri tveimum árum síðani.

Hjá kvinnunum gjørdist Ljósið nummar tvey, meðan Flog – sum er nýtt felag í hesum sambandi – endaði á triðja plássinum.

Sum nevnt, so verður aftur stórkapping á skránni komandi vikuskifti, tá pinkurnar og gentur fara at kappast, og aftur hesa ferð verður tað Ítróttarhøllin í Runavík, sum verður karmur um tiltakið.



*Aftur í ár verða tað fimleikakvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag, sum verða føroyskt gestalið, tá kappast skal um DM-gullið í rútmiskum fimleiki*
*Mynd: Maria Olsen*

## Úrslit frá stórkappingini

**Smágentur - Frí kapping**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ljósið I | 16,88 |
| 2 | Støkk | 16,72 |
| 3 | Havnar Fimleikafelag | 16,50 |
| 4 | Ljósið II | 15,90 |
| 5 | Flog | 13,50 |

**Smágentur - Amboðskapping**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ljósið 1 | 16,61 |
| 2 | Ljósið II | 16,17 |
| 3 | Havnar Fimleikafelag | 16,11 |
| 4 | Støkk | 16,01 |
| 5 | Flog | 13,18 |

**Smágentur - Samanlagt**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ljósið I | 33,49 |
| 2 | Støkk | 32,73 |
| 3 | Havnar Fimleikafelag | 32,61 |
| 4 | Ljósið II | 32,07 |
| 5 | Flog | 26,68 |

**Kvinnur - Frí kapping**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnar Fimleikafelag | 18,49 |
| 2 | Ljósið | 18,26 |
| 3 | Flog | 16,16 |

**Kvinnur - Amboðskapping**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnar Fimleikafelag | 17,03 |
| 2 | Ljósið | 16,36 |
| 3 | Flog | 15,93 |

**Kvinnur - Samanlagt**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnar Fimleikafelag | 35,52 |
| 2 | Ljósið | 34,62 |
| 3 | Flog | 32,09 |